# Liggur stilt í løtuni

**Samráðingarnar ímillum Starvsmannafelagið og fíggjarmálaráðið hava ligið í dvala, tí Fìggjarmálaráðið hevur so nógv um at vera við øðrum samráðingum**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Vit eru ikki serliga nøgd við, at samráðingarnar draga út av tí at Fíggjarmálaráðið er undirmannað við samráðingarfólki, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum*

Seinastu dagarnar hava samráðingarnar ímillum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið ligið mestsum í dvala.

Men tað er ikki tí at ósemja skilir partarnar.

Orsøkin er, at Fíggarmálaráðið hevur so nógvar sáttmálar at samráðast um, at tað gongur nokk so seint.

Og í løtuni skal Fíggjarmálaráðið eisini undir seming við Pedagogfelagið og tí eru samráðingarnar við Starvsmannafelagið parkeraðar til tað er avklárað.

– Fíggjarmálaráðið hevur ikki orku at samráðast við allar partar og tí dregur út.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at hann er misngdur við, at almenni myndugleikin røkir ikki sína uppgávu til fulnar, tá ið lønardeildin er so illa mannað, at hon ikki hevur frægari umstøður at samráðast.

Annars vil formaðurin í Starvsmannafelagnum ikki siga so nógv um samráðingarnar.

Men uppleggið er umfatandi við tað, at lagt verður upp til, at sáttmálin skal ganga yvir fleiri ár enn tey vanligu tvey árini og tað tekur sína tíð at gjøgnumganga møguleikarnar.

Og í løtuni eru tey mitt í samráðingunum og enn er als ikki komið har til, at tað ber til at siga nakað um, hvønn veg tað ber.

Annars hevur Fìggjarmálaráðið boðað frá, at tað tekur undir við at sáttmálaskeiðið verður longri og ráðið er eisini sinnað at tosa um eina lønarhækking.

Hinvegin vil Starvsmannafelagið eisini broytingar í arbeiðsvikuni.

Í Løtuni er arbeiðsvikan 39 tímar, men tá ið mattíðurnar eru tiknar frá, er effektiva arbeiðstíðin 36,5 tímar.

Nú vil Starvsmannafelagið hava mattíðurnar tiknar burturúr, so at partarnir bara fevnir um effektivu tíðina.

Annars vil Gunnlevur Dalsgarð onki siga um lønarkrøvini enn.

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

## Búskaparfrøðingur

HAGSTOVAN SÓKNAST EFTIR EINUM BÚSKAPARFRØÐINGI TIL AT STANDA FYRI HAGTØLUNUM UM GJALDSJAVNA OG UTTANLANDSSKULD.

### Ábyrgd

Uppgávan er at stíla fyri innsavningini og viðgerðini av upplýsingum til hagtøl um gjaldsjavna og uttanlandsskuld, at fremja uppgerðina sambært altjóða forskriftum og at kunngera úrslitini alment.
Tú situr ikki einsamallur ella einsamøll við uppgávuni, tí búskaparfrøðingarnir á Hagstovuni eru saman í toymi, sum arbeiðir tætt saman í felags arbeiðsætlan, har hvør einstakur kortini hevur sínar ábyrgdir.

### Førleikar

Vit sóknast tí eftir einum væl útbúnum búskaparfrøðingi, við áhuga fyri tjóðarbúskapi og hagtølum sum heild.
Góðir førleikar til hagtalsliga viðgerð av innheintaðum upplýsingum eru neyðugir og kunnleiki til vinnuligu viðurskiftini í landinum er ein fyrimunur.
Góð samstarvsevni og positivan hugburð til uppgávuna leggja vit stóran dent á.

### Starvið

Starvið er fulltrúastarv á Hagstovuni og verður samsýnt við løn sambært galdandi sáttmála millum Búskapar- og Løgfrøðingafelagið og Fíggjarmálaráðið.
Umsóknarfreistin er 1. novembur 2006, tá skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi. Vilt tú vita meira um starv, treytir og arbeiðspláss, ring so til Hermann Oskarsson ella John Jacobsen á telefon 35 28 00.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO